## Kórtiltak í Vágum

Leygardagin 31. mars skipar Vágakórið fyri stórum tiltaki í ferðamannaheiminum á Giljanesi. Fyrrapartin verður tombola og seinnapartin .loppumarknaður. Kl. 16 syngur Katrina Petersen, kórleiðari, og Heðin Ziska, guitarleikari í bólkinum Marius, spælir afturvið. Kl. 17 og kl. 19 syngur Vágakórið, og kl. 21 verður felagssangur við Jákupi og Andrassi. Tiltakið hjá Vágakórinum byrjar leygardagin kl. 10 og endar seint á kvøldi.



Leiðarin á sjúklingahotelli:

# – Grovt álop á okkum frá



- *Tað er hent meira enn ta einu ferðina, at sjúklingar, ið Jákup Petersen hevur sent á Ríkissjúkrahúsið eru sendir heimaftur óviðgjørdir, tí hann hevur skipað alt ov illa fyri, sigur leiðarin á sjúklingahotellinum í Keypmannahavn, Anna Maria Durhuus*



**Atfinningar frá yvirlækna á Landssjúkrahúsinum á Hotel Tórshavn í Keypmannahavn, eru ovboðin fyri leiðarin á sjúklingahotellinum, sum heldur tær vera undir alt lágmark og onki at hava við veruleikan at gera**

*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*

Áheitanin í Sosialinum 19. mars frá Jákupi Petersen, yvirlækna á Landssjúkrahúsinum, á landsins myndugleikar um at stongja føroyska sjúklingahotellið í Keypmannahavn, sleppur ikki at standa ósvarað. Í eini viðmerking í blaðnum í dag skrivar leiðarin á Hotel Tórshavn, Anna Maria Durhuus, at nú er starvsfólkunum á sjúklingahotellinum ovboðið.

»Nógv av tí, ið Jákup Petersen sigur, hevur als ikki hald í veruleikanum. Tað eru tikið úr tómum heimi og ber boð um, at JP ikki hevur neyðugan kunnleika um Hotel Torshavn sum stovn«, skrivar Anna Maria Durhuus, og setir samstundis spurnartekin við, hvat býr undir fyrsta setningi hjá yvirlæknanum, har hann skrivar: »Hotel Tórshavn er eitt skip uttan skipara, sum siglir sín egna sjógv við sínum vandamikla farmi?«

»Merkir hetta, at Jákup Petersen ikki viðurkennir sjúkrarøktarfakligu leiðsluna og heldur hana vera tað sama sum eingin leiðsla, og at her er eingin ábyrgdarskylda?«

Til hetta svarar Anna Maria Durhuus sjálv, at »Hotel Torshavn er sjúklingahotell líkt øðrum sjúklingahotellum í Norðurlondum. Leiðslan á teimum er sjúkrarøktarfaklig starvsfólk - ikki læknar. Rætt er, at summi sjúklingahotell koma undir sjúkrahús. Men soleiðis er ikki hjá okkum, tí landafrøðiliga ber tað ikki til. Vit halda kortini, at vit hava eitt frálíkt samstarv við øll trý sjúkrahúsini í Føroyum um teir sjúklingar, ið verða sendir niður higar«, skrivar leiðarin á Hotel Torshavn.

Víðari vísir hon á, at Jákup Petersen heldur tað vera ein stóran trupulleika í Keypmannahavn, at Hotel Torshavn bæði er hotell, umsorgan, viðgerð, rehabilitering, seingjadeild og uppihald, sum eingin hevur ábyrgd av.

»Jú, vit veita nógva umsorgan á Hotel Torshavn, men tær viðgerðir, ið fara fram her, eru tær somu, sum heimrøktin tekur sær av. Til dømis at skifta á sárum, umsita heilivág, dryppa eygu og tílíkt.

Rehabilitering og seingjadeild hava vit ikki, av tí at øll, ið búgva her, eru sjálvhjálpin. Eitt og hvørt føri, ið krevur rehabilitering ella sjúkrahúsrøkt er á Ríkissjúkrahúsinum ella í Føroyum. Vit hava ikki sjúklingar liggjandi – sum hann málber seg. Vit hava bara sjúklingar, sum eru í viðgerð ella til kanningar á Ríkissjúkrahúsinum. Tá ið viðgerðartíðin er av, verða fólk send aftur til Føroya og føroysku sjúkrahússkipanina«, er svarið til føroyska yvirlæknan.

### Eigur at taka í egnan barm

Anna Maria Durhuus vísir á, at hava sjúklingar tørv á læknahjálp, meðan tey eru á Hotel Torshavn, verður samband fingið við deildina, tey eru víst til, við atliti til innlegging.«

Hon heldur, at føroyski yvirlæknin átti at tikið í egnan barm.

»Sum heild undrar tað meg, at Jákup Petersen ikki sjálvur arbeiðir í samsvari við tað, hann heldur kundi verið betri. Til dømis hevði munnligt samskifti millum ávísandi yvirlæknar í Føroyum og læknarnar á deildunum, sum sjúklingarnir verða vístir til, verið ógvuliga viðkomandi, áðrenn sjúklingurin vendir sær til Ríkissjúkrahúsið. Tað hevði verið viðkomandi og hevði spart sjúklingum nógva óneyðuga ørkymlan og bíðitíð og harvið føroyska sjúkraverkinum nógvan pening«, skrivar Anna Maria Durhuus.

Hon heldur, at Jákup Petersen ígjøgnum alt sítt innlegg kemur við ógrundaðum pástandum.

»Endurtikin uppáhald um, at eingin ábyrgd er fyri røkt og umsorgan fyri teimum, ið eru á Hotel Torshavn. Tað eg veit, eru tað ikki yvirlæknar, ið hava serkunnleika í hesum yrki, men sjúkrarøktarfrøðingar. Sjúkrarøkt er sjálvstøðug yrkisgrein, sum ikki læknar stýra, men sjúkrarøktarfakligir leiðarar. Tað er meira enn so hugsandi, at Ríkissjúkrahúsið ikki altíð tilskipar sjúklingagongdirnar fyri føroyskar sjúklingar á besta hátt. Men veruleikin